## DAGSINS MEINING

# Páskir

Páskini, størsta og elsta kristna hátíðin, standa fyri durum. Páskaboðskapurin er okkara einasta felags livandi vón – einasta veruliga ljós í eini fyri mannaættina daprari tíð. Tað hevði verið vælsignað, um vit kundu hildið í Páskir í einum heimi við friði og bjørtum framtíðarútlitum. Men so er sum øllum kunnugt ikki. Milliónir fara undir Páskirnar í neyð, líðing, hungri og halli, armóð og vesældómi. Myndirnar av soraðum húsum og løstaðum, sum hvørki fáa vátt ella turt - tíðansheldur ta mest átrokandi læknahjálp, eru gerandiskostur í fjølmiðlunum. Sigurharrarnir reypa og fegnast við sigurin, alt meðan heilt ófatiligar líðingar sum ein endaleysur streymur fara framvið okkum eftir sjónvarpsskýggjanum. Sum í øllum kríggjum eru børnini verst fyri. Tey duga ikki at verja seg og koma sær tí í vanda ella tey verða rakt heima við hús. Øll tey særdu og lamløstaðu børnini í Iraq kundu komið undir læknahond alt fyri eitt, um sigurharrarnir høvdu viljan til tess. Men teir tykjast venda tíverri blinda eyga til tær líðingar og ta neyð, sum herferð teirra elvir civilfólkinum.

Kríggið móti Iraq kann fatast sum ein sigur fyri fólkaræði og frælsi. Tað vil tíðin vísa. Men moralskt hava sigurharrarnir tapt, um teir ikki alt fyri eitt tryggja lóg og landaskil, fáa heilsuverkið at virka, útvega neyðuga læknahjálp og heiluvág og endurreisa vatn- og orkuverkini, sum teir hava sorað. Alt hetta kostar bert ein brotspart av tí sum sjálvt kríggið kostar. Tað finst eingin umbering fyri ikki alt fyri eitt at seta í verk eina humanitera herferð, sum kann tryggja normal viðurskifti í Iraq. Men hetta tykist hava ov lítlan áhuga hjá teimum sameindu, og tí hava teirra politisku leiðslur í dag ein ovurstóran moralskan trupulleika.

Her hava vit bert nevnt Iraq, men støðan í øllum triðja heiminum bara versnar. Vesturheimurin gerst ríkari og ríkari, meðan menningarlondini gerast alt fátækari. Tað hevði tí sømt seg fyri ríka Vesturheimin at farið í hernað móti hungri, halli, sjúkum, fátækdømi, analfabetismu, politiskum harðskapi og so byggt eina Verð, har pláss er fyri øllum – har øll eiga lívsins rætt og lívsfrælsi. Tað hevði ikki verið nakar lættur ella skjótur sigur. At vunnið tann sigurin hevði vart eini 30-50 ár, men tað hevðið verið ein varandi sigur, sum sømdi seg einum humanum, mentaðum og kristnum Vesturheimi. Hevði Vesturheimurin dugað at skoðað Páskaboðskapin í ljósinum av hesari heimsmynd, hevði framtíðin verið ljós og bjørt fyri øll heimsins fólk – og ikki bert tey vælbjargaðu. Góðar Páskir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fleiri bein at standa á

**Simme Jacobsen**

So, búskaparráðið og hagstovan vilja billa okkum inn, at tað, at vit ikki hava "fleiri bein at standa á", helst er tí, at tey beinini, sum teir pástanda eru til, kanska ikki eru skrásett! - Og tað tvætlið fáa teir løn fyri at siga!

Nei, í dag kanst tú ikki snara tær á, uttan at verða skrásettur, og so slett ikki útflyta nakað óskrásett. Um ikki annað kundu teir skeitt í MVG-roknskapin hjá Toll & skatt, tí einki yvir 20.000 kr. um árið kann verða selt uttan um MVG-skrásetingina.

So helst man tað vera fyri at káva útyvir, at so illa stendur til við at upparbeiða nýggjar vinnur undir hesari samgonguni, ella ha?

Nei, tað er ikki bara undir hesari samgonguni, tað er yvirhøvur tungt, fyri ikki at siga ógjørligt at seta nakað lønandi á stovn í Føroyum. Orsøkirnar eru fleiri, og eg skal nevna nakrar, sum eru sera tyngjandi:

1) Vit liggja langt og tvørt frá stórum marknaðum.
2) Vit eru fáment, og nógv av tí besta fólkinum flytur av landinum.
3) Kanningar vísa, at tá allar afturberingar eru íroknaðar, hevur Danmark heimsins hægsta skattatrýst uppá 52 %, og nr. 2 er Svøríki við 51 %. Vit hava ikki so nógvar afturberingar (boligtilskud etc.) sum í Danmark, so vit hava uttan iva heimsmet í skattatrýsti.
4) Og nú tað, sum liggur mær serliga nógv á hjarta: Okkara MVG er for høgt.

Til ber at arbeiða uppá øll hesi punktini, og vinnulívið roynir av øllum alvi at basa trupulleikunum, sum standast av teimum. Men tíverri er føroyskur politikkur meira klandur og kradd enn konstruktivt arbeiði, meira at flyta runt við Svartaperi, enn at beina fyri honum.

Tá ið MVG varð sett á stovn í Føroyum, seldu polittikararnir okkum tað við lyftum um lægri inntøkuskatt, tá ið brúksskatturin kom. Men hvat hendi? MVG-ið kom omaná inntøkuskattin, sum var methøgur frammanundan. Og tað versta var, at føroyskar vørur og tænastur beinleiðis dýrkaðu, meðan útlendskar vørur hildu prísirnar, tí tollurin lækkaði tilsvarandi MVG-num.

Á tann hátt varð føroyskt initiativ sparkað út á síðulinjuna, og útreiðslustøðið reyk beint up í loft, bæði hjá familjuni og hjá vinnulívinum.

Okkara viðbrekna samfelag tolir ikki 25% MVG. Tað gevur heilt einkult so høgt útreiðskustøði, at kappingarførið rýkur sær ein túr.

Tað sæst eisini klárt, tá ið okkara størstu vinnur mugu fáa MVG-lætta fyri at klára seg ígjøgnum, og nógvar smáar og smærri fyritøkur og handlar hava lagt frá sær hesi árini, tí tað er alt for strævið at arbeiða og fáa nakað upp at standa við verandi lóggávu.

Ein nýggj vinna, sum ætlar sær at útflyta, má fyrst vera so stór, at hon kann samráðast um MVG-lætta, fyri bæði at kunna vera kappingarfør og endurnýggingarfør. Ung Virki sýna stórt initiativ, men tey renna seg skjótt føst í MVG- og útreiðsludýnuna, og tað mesta sovnar tí so blídliga aftur.

Tað eru m.a. øll hesi viðurskiftini, ið nú síggjast aftur í hagtølum, og ikki ein vantandi skráseting av útflutningi. Hatta var for bíligt sloppið. Siga teir, at útflutningsvøra verður smuglað av landinum?

Fyri at venda aftur til MVG-ið:

Tá ið eitt nú Bretland klárar seg við 17,5 % og Týskland við 16 % í MVG, hví er so neyðugt hjá okkum slaviskt at herma eftir skandinavum við at hava 25 %? Duga teir betri enn hinir? Eg haldi, at rákið vísir nakað annað: Teirra vinnur flýggja eisini av landinum fyri at kunna menna seg.

Hevði tað ikki verið betri at haft vinnur, ið orkaðu at gjalda fólki løn, og sum kundu endurnýggjað seg og marknaðarført seg, heldur enn at kunna reypa av einum ovurstórum landskassa? Og hvat er blivið av kappingarførinum hjá vinnuni, nú líkindini hava verið av teimum bestu hesi seinastu árini?

Tað liggur sjálvandi væl tyrvað í landskassanum!

Eitt MVG uppá 15 % yvir ein kamb hevði loyst nógv problem í landi okkara, eg vil lata fantasiin fáa frítt spæl: Lønar-politikkur, bústaðar-politikkur (jú, nakað eitur so), heilsupolitikkur, pensiónir, investering, handil, ferðavinna, hondverk, smáídnaður av alskins slag, landbúnaður o.s.fr. fyri ikki at tala um høvuðsvinnur okkara. Eg kann lítið ætla, hvussu alt hevði sprottið undan kavi, sum nú bert eru dreymar undir dýnuni!

Tann sum tá skuldi spart, er tann sum í dag er alt ov búkut: Lands-umsitingin! Men tað man fara at vera seinur dagur, áðrenn hon fer at minka játtaninar til sín sjálvs, so má bresta ella bera.

Vælferðarsamfelagið hjá okkum er blivið so dýrt at umsita, at ikki er ráð til sjálva vælferðina.

# Tað er púra óvist

### - ein tøkk til formannin í Føroya Blaðmannafelag

**Høgni Hoydal**

Hervið skal eg takka fyri svarið frá formanninum í Føroya Blaðmannafelag.

Eg vísti á, at hann hevur sagt ósatt um undirritaða og lagt orð í mín munn, sum eru beinleiðis ósonn. Sera grovar pástandir enntá.

Harvið hevur hann gingið undan við slatri og sleygi í føroyskum fjølmiðlum.

Eg vísti á, at hann hevði allar møguleikar at kanna málið, um hann vildi hava veruleikan á borðið.

Í svarinum endurtekur formaðurin bara, at hann hevur rætt. Ongin grundgeving, ongi prógv – enn ikki ein ávísing til, hvør keldan er til hansara íspunnu søgu.

Formaðurin í fakfelagnum hjá fjølmiðlafólki kann bara sleingja okkurt út í fjølmiðlarnar, sum hann sigur seg hava hoyrt. Og tá hann verður biðin um eina frágreiðing, eina grundgeving ella eitt prógv, sigur hann bara: "Tað er púra vist!"

Takk fyri hetta greiða svar. Tað sigur meira enn 1000 orð.

So vita vit tað. At tú ikki skalt rokna við øðrum enn slatri og sleygi. At um tú loyvir tær at vísa á skeivleikar og ógrundað uppáhald í fjølmiðlunum, so sigur formaðurin í fakfelagnum hjá fjølmiðlafólki, at tað er bara so sum fjølmiðlarnir siga.

Næstu ferð kann hann tildømis svara: "Vit tíma ikki at lurta eftir tær, hóast tú hevur prógv, vøi, vøi, vøi!"

Tá er alt eftir mínum tykki púra óvist.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



Henrik Old:

# Nú føla teir seg illa

**– Tað, sum nú fer fram, líkist eini herferð ímóti suðuroyingum, heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Tað, sum nú fer fram, líkist eini herferð ímóti suðuroyingum.

Tað heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum, ikki, at nakar ivast í.

Tað, hann sipar til, er at bæði landsverkfrøðingurin og landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hava í seinastuni verið í sjónvarpinum og talað ímóti ætlanini at tengja arbeiðini at gera tunnil ímillum Øravík og Hov og samferðsluhavn í Trongisvági saman.

Hetta er annars tað, sum bæði samgongutingmaðurin úr Suðuroy mælir og meirilutin í vinnunevndini mæla til, tí tað fer at føra til eina sparing uppá 45 milliónir og ein nógv betri tunnil.

Ein orsøk til at landsstýrismaðurin og Landsverkfrøðingurin eru ivasamir, er, at so verður samferðsluhavnin ikki liðug tá ið nýggja suðuroyarskipið kemur.

Eins og Hergeir Nielsen, heldur eisini Henrik Old, at tað ger minni, at samferðsluhavnin verður seinkað einar tveir, tríggjar mánaðir, tí afturfyri fæst ein loysn, sum bæði er nógv betri og nógv bíligari.

Verður samferðsluhavnin ikki akkurát liðug til tíðina, taka vit tað við, ti tað eru aðrir møguleikar at fáa nýggja Smyril at bryggju í Suðuroy hesa tíðina.

### Føla seg illa

Men á ein hátt skilir hann, hví teir báðir eru so nógv ímóti at tengja báðar verkætlanirnar saman.

Upprunaliga ætlanin hjá landsverkfrøðinginum var at gera tunnil uppi í fjøllunum, har tað ikki slepst undan einum stórum parti av fjallavegnum.

Men nú hevur NCC boðið sær til at gera ein tunnil niðri í dalinum har tað slepst undan allari vegagerð.

Hetta er ein nógv betri tunnil har tað slepst undan at fara í fjøllini. Men verður arbeiðið upp á tunnilin og ferjuleguna tengd saman, er talan um eina sparing uppá 45 milliónir afturímóti tí, sum Landsverkfrøðingurin og Bjarni Djurholm hava skotið upp.



*Henrik Old sigur, at hann vildi ikki lata seg trýsta til at avgreiða málið, uttan at viðgera tað ordiliga*

Tað sigur seg sjálvt, at ber tað til at tengja bæði arbeiðini saman og at gera tey fyri ein prís sum bara nøkunlunda lí kist tí, sum nú er frammi, er tað ein ógvuliga stórur, fakligur ósigur fyri Landsverkfrøðingin og politiskur ósigur fyri Bjarna Djurholm, sum ætlaði at fremja tað í verki.

– So er tað klárt, at teir føla seg illa og gera, hvat teir kunnu fyri at venda eyguni frá hesi ætlanini.

Hann vísir eisini á, at vinnunevndin fekk uppskotið til viðgerðar 21. desember, sum var seinasti dagur fyri jól.

– Tað skerst heldur ikki burtur, at vinnunevndin, og serliga eg sjálvur, sum formaður, føldi eitt ávíst trýst frá landsstýrismanninum og Landsverkfrøðinginum at fáa málið avgreitt sum skjótast.

– Og tað skerst heldur ikki burtur, at tað kom illa við, tá ið eg gjørdi teimum púra geitt, at vinnunevndin ætlaði at kanna málið út í æsir og at hon fór at brúka tað tíð, sum var neyðug, til eina nágreiniliga viðgerð.

– Vit tykist eisini sum um bæði landsstýrismaður og landfsverkfrøðingur halda, at vinnunevndin er ein avgreiðsluskrivstova, har tað ber til at koma við stórum málum og fáa tað bláa stemplið, uttan at vit hava kannað tað væl og virðiliga fyrst, so so lætt gongur tað ikki, sigur Henrik Old.

Hann skoytir uppí, at tað ber til at gera ein heilan tunnil til Dals fyri tær 45 milliónirnar, sum verða spardar við at tengja arbeiðini uppá samferðsluhavnina og tunnilin í Suðuroy saman.

# Seksti ár á arbeiðsmarknaðinum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag fylti 60 ár tann 9. apríl. Einki verður gjørt burtur úr degnum nú, men á vinnudegnum í heyst fer føðingardagurin at verða hildin**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*

Tann 9. apríl vóru liðin 60 ár, síðan Føroya Keypmannafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag tóku stig til at stovna eitt meginfelag fyri arbeiðsgevarar í Føroyum. Felagið fekk navnið Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum og skrivari hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, sigur, at nevndin hevur gjørt av einki at gera burtur úr degnum nú.

Hinvegin verður okkurt gjørt burtur úr á árliga vinnudegnum, sum verður hildin í heyst, sigur hann.

Tá Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri 10 árum síðan hevði 50 ára føðingardag, varð heitt á Jógvan Arge, tíðindamann, um at skriva bók um søgu felagsins. Bókin verður envnd »Semjur og stríð«.

Men av tí, at samfelagið alt var í svárari kreppu tá, varð ikki hildið rætt at gera nakað meira hóvasták burtur úr at hátíðarhalda ein føðingardag, greiðir Jan Mortensen frá.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í dag umleið 170 limir. Í núverandi nevndini fyri Arbeiðsgevarafelagið sita:

Vilhelm M. Johannesen, formaður, Kristoffur Laksá, næstformaður, Leivur D. Michelsen, Bergur Poulsen, Jóhan Páll Joensen, Magni Arge og Gudmund Mortensen.



*Vilhelm M. Johannesen er í dag formðaur í Føroya Arbeiðsgevarafelag*

# Bjarni Djurholm provokerar suðuroyingar

**Hann kann gott spara sær at kanna um nýggi Smyril kann leggja at á Gomlu Rætt, sigur Hergeir Nielsen, sum eisini er í samgongu**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

– At Bjarni Djurholm nú fer at kanna um tað ber til hjá nýggju suðuroyarferjuni at leggja at á Gomlu Rætt, taki eg sum eina provokatión ímóti Suðuroyingum.

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, er alt annað enn fegin um tað, sum Bjarni Djurholm førdi fram í Degi og Viku mánakvøldið um, at hann hevði biðið Landsverkfrøðingin kannað eftir um tað ber til hjá nýggja suðuroyarskipinum at brúka havnina á Gomlu Rætt heldur enn at sigla til Havnar, tí tað er so tongt í Havn.

– Hatta er ein provokatión, sigur Hergeir Nielsen.

Hann sigur, at suðuroyingar hava aldargomul rættindi til at sigla til Havnar og tey rættindi fara vit at halda fast við.

- Tí kann landsstýrismaðurin spara sær at kanna møguleikarnar á Gomlu rætt.

–Vit halda fast um rættin at sigla til Havnar.Tann rættin fara vit at halda fast um og tað skal bera til, sigur Hergeir Nielsen.

Eisini Henrik Old, formaður í vinnunevndini heldur, at hetta er so langt úti, at hann tímir illa at gera viðmerkingar til tað.

– Sjálvandi skulu suðuroyingar sigla á Havnina og alt annað er langt úti, sigur hann.

*Framhald frá síðu 15*

løgd, tá ið eg fór á pallin í Forum fríggjakvøldið við kekkinum upp á 10.000 krónur, sum Atlantsflog stuðlaði tiltakinum við, tí tá var eg bangin fyri, at tað skuldi blíva ov nógv tos.

Men tá ið eg so fór aftur á pallin at syngja, vóru nervarnir sum blástir burtur.

### Tvær konsertir í Føroyum

Hóast tað ikki eydnaðist henni at vera við á páskakonsertini í mentanarhúsinum í Fuglafirði leygardagin, tí hon varð bundin av uppgávum sum fylgdi við sigrinum í Stjerne for en aften, verða føroyingar ikki við sviðusoð.

Tí fyrst í næsta mánað kemur Guðrun til Føroyar at halda konsert saman við Jacob, sum varð nummar tvey í kappingini og Martin, sum eisini var við.

Í Føroyum verða tvær konsertir: 9. mai verður konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta verður ein konsert har áhoyrararnir standa og hon byrjar klokkan 23 og bussar koyra ymsastaðni frá í sambandi við konsertina. Dagin eftir, 10. mai, verður konsert í Norðurlandahúsinum í Havn. hetta verður ein konsert við sitiplássum og hon byrjar klokkan 20.

Á hesum báðum konsertunum fer eisini Brandur Enni at syngja onkrar sangir.

### Atgongumerki við avslátri

Tað er Føroya Banki, sum er høvuðsstuðul til hesar báðar konsertirnar. Og til konsertina í Fuglafirði, fer bankin at atr selja 100 atgongumerki við stórum avslátri.

Atgongumerkini við avslátri kunnu keypast á www.kontoin.fo og sølan skuldi lata upp mikudagin 16. apríl.

Vanligir prísur fyri eitt atgongumerki er 195 krónur, men frá Føroya banka kosta tey 125 krónur, so 100 tey fyrstu sum fara inn á heimasíðuna, kunnu ogna sær eitt bíligt atgongumerki.

Annars byrjar sølan ikki fyrrenn eftir páskir.